# Halgatrý omma er góð við tykkum

**Hóast veðrið ikki var til vildar, so komu heilt nógv børn at síggja Trølla-ommuna, tá hon vitjaði á Shellstøðini í Klaksvík leygardagin**

BARNATILTAK
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:**
Heilt nógv fólk vórðu savnað við Shell-støðina leygardagin í sambandi við, at sølubúðin er liðugt umbygd. Niclas Heri Jákupsson hevur ikki talið, men hann sigur, at tað vitjaðu ómetaliga nógv fólk allan dagin. Men um fimmtíðina vóru heilt nógv, tí tá skuldi Trølla-omman koma á vitjan.

Fyrr um dagin høvdu Shell og Mjølnir skrivað undir sáttmála, og klokkan 17 skuldi Trølla-omman koma á vitjan.

Tað regnaði, men tað lat ikki til at gera tað minsta. Børn og vaksin gingu inn og út úr sølubúðini, har sodavatn og køkur vóru at fáa. Hetta stytti um bíðitíðina til omman kom. Brádliga hoyrdist floyt frá einum oljubili. Í einum av stóru bilunum hjá Shell kom Trølla-omman koyrandi. Hon veittraði út gjøgnum bilrútin og bað børnini bíða, meðan bilførarin fór at venda bilinum.

Børnini so gjørdu, men kortini runnu tey ímóti bilinum, tá hann kom inn á økið rundan um støðina.

Omman leyp løtt á tá úr bilinum, og fleiri av børnunum fingu ein koss.

– Og halgatrý omma er góð við tykkum, segði hon, meðan hon tók tvørtur um fleiri børn. So byrjaði hon at býta góðgæti út til teirra.

– Ger so væl, og ger so væl. Hygg her, omma hevur sjálv bakað, segði Trøllaomman, meðan hon býtti Twix út til børnini.

Nógvar smáar barnahendur rættu seg fram ímóti henni. Nakrar ferðir royndi hon at sleppa eitt sindur nærri sjálvari sølubúðini í Shell, men tað eydnaðist ikki, tí har vóru so nógv børn, og øll vildu hava okkurt leskiligt frá Trøllaommuni.

– Nå, nú er posin tómur. Er tað nakar, sum vil eiga hann, rópti omman einaferð. Nógv børn stóðu sum kánus, men flennandi tók omman ein annan posa og helt fram at býta út.

Tað var nakað strævið fyri ommuna at vera einsamøll um uppgávuna at býta út, men Trølla-Pætur var sum skilst upptikin onkra aðrastaðni, so hann fekk ikki verið við.

Men alt eydnaðist kortini væl hjá ommuni hendan dagin, og øll børnini fingu hana at síggja og okkurt søtt.



*– Ger so væl. Omma hevur sjálv bakað, rópti Trølla-omman til børnini, meðan hon gav teimum Twix*



*Børnini fingu eisini sodavatn at drekka, meðan tey bíðaðu eftir ommuni*



*Hvussu nógv fólk vitjaðu í Shell leygardagin, er ilt at meta um, men leiðarin, Niclas Heri Jákupsson, sigur, at ómetaliga nógv fólk vitjaðu allan dagin*

# Eitt høvi til hugna

**– Veitslurnar fyri støk er ein møguleiki til tey støku at fara út til ein góðan bita og at hugna sær. Tað er ikki altíð eins hugaligt at fara út aleinaður, og tískil kann ein tílík veitsla vera eitt gott høvi til at sleppa út og hugna sær, sigur ein av fyrireikarunum Dagbjørg Hjaltalin**

VEITSLA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Fyri triðju ferð verður skipað fyri veitslu fyri støkum. Hon verður 30. okt. við borðhaldi og dansi. Tað eru Dagbjørg Hjaltalin og Ólavur Groth, sum skipa fyri veitsluni.

Dagbjørg greiðir frá, at hon fekk hugskotið, tá hon var til eina tílíka veitlsu í Danmark fyri nøkrum árum síðani. Síðani spældi hon við tankan í eina tíð, inntil hon fann ein at skipa fyri tí saman við, sum hevði haft somu tankar.

– Endamálið er simpulten at geva teimum, ið sita einsamøll eitt høvi til at fara út at skemta og hugna sær, sigur hon.

Hon greiðir frá, at ein dama, sum hevði verið til veitsluna hjá teimum segði, at hon varð vorðin einkja fyri nógvum árum síðani og hevði ikki verið úti síðani tá Men hon lat so væl at veitsluni og segði, at hon hevði farið aftur, um tað so var dagin eftir.

– Tá ein er stakur, er ein ikki so ofta úti og etur ein góðan bita, tí hava vit gjørt av, at tey skulu fáa ein góðan bita til veitsluna við trimum rættum og síðani dans aftaná. Hetta kvøldið verður tað X-Rays ið spælir. Men samstundis fáa tey eisini høvi til at sita og práta við borðið og læra hvønn annan at kenna, greiðir Dagbjørg frá.

Veitslan fyri støk verður tann 30. oktober, og freistin at tekna seg er úti tann 21. oktober.

# Shell og Mjølnir tvey ár

**Leygardagin varð ein tvey ára sáttmáli millum flogbóltsfelagið Mjølnir og Shell undirskrivaður**

SÁTTMÁLI
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Klokkan 15 skrivaðu Niclas Heri Jákupsson, leiðari og Eyðbjørn Andreasen, formaður í Mjølni undir tvey ára sponsoravtalu.

Fleiri av leikarunum hjá bæði kvinnu- og mansliðnm í meistaradeildini vóru tilstaðar. Bæði liðini hava fyri stuttum spælt seg í steypafinaluna, og ber tað brá av, at kappingarárið hjá Mjølni kann fara at gerast gott aftur í ár.

Niclas Heri Jákupsson sigur, at tað hevur stóran týdning fyri Shell at vera stuðul hjá Mjølni.

– At síggja okkara merkið á klæðunum hjá so sunnum, røskum og seriøsum ítróttarfólki, sum ferð eftir ferð hava megnað at fáa eitt flott úrslit, kann ikki annað enn vera gott, sigur hann.



*Niclas Heri Jákupsson og Eyðbjørn Andreasen skrivaðu undir tvey ára sáttmálan leygardagin*



Fosturtøka:

# Kvinnur ikki líka fyri lógini

**Annita á Fríðriksmørk, løgtingskvinna hjá Tjóðveldisflokkinum, heldur ikki, at allar føroyskar kvinnur eru líka fyri fosturtøkulógini. Tær, sum hava fíggjarliga ella sálarliga orku til at fara niður at fáa fosturtøku, fara. Meðan tær, ið ikki hava neyðugu orkuna, verða í Føroyum og eiga barnið, vísir tingkvinnan á**

FOSTURTØKA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

– Føroyska fosturtøkulógin forðar ikki fosturtøku. Tað sigur Annita á Fríðriksmørk á heimasíðuni hjá Tjóðveldisflokkinum. Her hugsar hon um, at tær føroysku kvinnurnar, sum vilja hava fosturtøku, men ikki fáa hana í Føroyum, kunnu fara niður. Men so eru tað nakrar, sum ikki hava fíggjarligu ella sálarligu orkuna til at fara niður, og tískil mugu tær føða barnið.

– Tað ger, at allar føroyskar kvinnur ikki eru líka fyri lógini, vísir Annita á.

Hon leggur afturat, at tað er tað sama galdandi, tá tað kemur til kommunulæknan.

– Á bygd eru kvinnurnar ikki líka væl fyri, sum kvinnur í Havn. Tí í høvuðsstaðnum hava vit jú fleiri kommunulæknar, og tað frættist skjótt, hvør lækni er so mikið liberalur, at hann finnur ein ella annan útveg, so at ein kvinna kann fáa eina fosturtøku. Tað er ikki galdandi í bygdum, har kanska bara tann eini læknin er, sigur Annita á Fríðriksmørk, sum samanber føroysku fosturtøkulógina við eina harmoniku.

– Ein liberalur lækni kann altíð finna ein ella annan máta at geva einari kvinnu fosturtøku uttan at bróta verandi lóg, sum hon er í dag. Men um vit fingu fría fosturtøku, so hevði ein lækni sum noktaði at geva fosturtøku brotið lógina, sigur Annita.

Annita heldur ikki, at tað kann vera rætt, at tað veldst um, hvønn hugburð eins kommunulækni hevur til málið, um ein kvinna fær fosturtøku ella ikki.

Hon heldur fram, at tað er jú sera ójavnt, hvussu læknarnir síggja upp á slíkt, og tískil kann tað koma at vera læknin, sum situr við tí avgerandi orðinum, og tað heldur Annita er beinleiðis skeivt.

## Kvinnumál

Annita er fyri fríari fosturtøku, og tað hevur tingkvinnan ongantíð lagt nakað skjól á. Ei heldur er hon bangin fyri, at tað kann skaða hennara egna politiska yrkið.

– Veljarin skal vita, hvar hann hevur meg. Eg skal ikki ganga aftan á honum, um ein kann siga tað so, sigur hon og leggur afturat, at hetta er ikki nakað nýtt í sjálvum sær. Annita segði eisini undir seinasta valstríðið, at hon er fyri fríari fosturtøku.

Men hon greiðir frá, at soleiðis hevur tað ikki altíð verið.

– Fyri nøkrum árum síðani helt eg ikki, at frí fosturtøka var tað rætta, men tað er broytt í dag við at eg havi munandi meira vitan um hetta, sigur Annita, sum ikki er í iva um, at endaliga avgerðin eigur at liggja hjá kvinnuni.

– Fosturtøka er ein sera álvarslig og stór avgerð, men tað kemur fyri, at gentur ella kvinnur koma í eina støðu, har fosturtøka er einasta valið fyri tær. Og at føra fram, at kvinnur við fríari fosturtøku fara at nýta tað sum fyribyrging, er púra burturvið, heldur løgtingskvinnan.

Annita sigur sjálv, at á ein ella annan hátt, so kennir hon tað sum sína ábyrgd at standa fram og royna at fáa glið á kjakið um fría fosturtøku, tí hon sjálv er kvinna.

– Kvinnan er tann, sum er næst hesum kjakinum. Harvið sigi eg ikki, at menn ikki hava eina meining um hetta og taka orðið á tingi, men jú, á ein ella annan hátt, so kenni tað sum mína ábyrgd, viðgongur hon.

Annita er eisini sannførd um, at um kvinnurnar vóru betur umboðaðar á tingi, á formanspostum ella í landsstýrinum, so hevði meira ljós verðið varpað á hetta málið, sum er so eymt og kensluborið fyri mong.

– Fosturtøka er ein spurningur um kvinnulig rættindi, staðfestir Annita.

## Vantandi orðaskifti

Annita vísir eisini á, at ov lítið orðaskifti er um júst hetta málið.

Tískil er hon farin í holt við at orða ein fyrispurning til landsstýrismannin við tí fyri eyga at fáa eitt orðaskifti í gongd.

Kjakið um fría fosturtøku er aftur við at blussa upp, orsakað av ætlaninunum hjá Kvindeligt selskab og Kamal Qureshi at seta á stovn ein grunn til føroysku kvinnurnar, sum velja at fara til Danmarkar at fáa eina fosturtøku.

Í viðmerking sínari sigur løgtingskvinnan seg vænta, at grunnurin ikki fer at fáa nakra umsókn.

– Føroyskar kvinnur, sum velja at fara av landinum til tess at fáa eina fosturtøku, gera tað so diskret, at tað síðsta tær kunnu finna uppá, er at søkja ein danskan grunn um stuðul, heldur Annita á Fríðriksmørk.

Annita greiðir frá, hon hevur fingið at vita frá politikarum í eitt nú Danmark, at síðani meira varð gjørt fyri at upplýsa um fyribyrging, er talið á fosturtøkum lækkað.

– Tá Finnland kom í kreppu herfyri, gjørdu tey av at lækka játtanina til upplýsing um fyribyrging. So er tað nokk so áhugavert, at talið á fosturtøkum fór upp, sigur hon og vísir á, at um frí fosturtøka skal verða í Føroyum, so má og skal størri dentur leggjast á upplýsing um fyribyrging.



*Annita á Fríðriksmørk heldur ikki, at allar føroyskar kvinnur eru líka í eygunum á føroysku fosturtøkulógini*

# J – dagur aftur á skránni

**Afturvendandi tiltakið við J–degnum, tá jólabryggið hjá báðum teimum føroysku bryggjaríunum fæst fyri bert 1 kr., er í ár settur at vera fríggjadagin 5. november**

Nú er ásett, at J-dagurin í ár verður 5. november. Henda dagin verða nýggju jólaølirnar hjá bryggjaríunum vístar fram.

Henda dagin er eisini gjørligt at keypa øl fyri bert 1 kr. Tó verða tað bert avmarkaðar nøgdir, ið verða seldar so bíliga, so tað ræður um at koma fyrst framat.

Hetta er eitt tiltak, sum donsku bryggjaríini leingi hava skipað fyri, bæði tá sølan av páska– og jólabrygginum byrjar. Seinastu árini hava tey føroysku bryggjaríini eisini verið við, og í ár verður J–dagurin sostatt fríggjadagin 5. november.

–eys–

# Hálvur tunnil

Tað gongur bara væl við arbeiðinum upp á Norðoyatunnilin. Sambært Norðlýsinum kann roknast við, at tað í hesi vikuni verður komið í helvt við boringini. Evstamark fyri at verða komin á mál við boringunum er í juni komandi ár, men væntast kann, at boringarnar verða lidnar fyrr enn so.

Tá ið boringarnar eru lidnar, verður farið undir at gera arbeiðið liðugt, og hetta skuldi tikið umleið eitt ár. Á hesum økinum er tó eisini góður møguleiki fyri, at arbeiðið gongur skjótari enn væntað, og Norðlýsið sigur seg vænta, at tað neyvan verður nógv seinni enn á jólum komandi ár, at arbeiðið upp á Norðoyatunnilin verður liðugt.

–tn–